## Axel á Mølini:

# Dramatiska ferðin við Niels Finsen í 1939

**Tað hevur ofta staðið á hjá føroyskum sjómonnum. Fleiri ferðir hevur tað verið tætt við teimum heilt stóru vanlukkunum. Eitt dømi var Waagen í 1888 á veg heim úr Íslandi við nógvum útróðrarmonnum. Eitt annað dømi um hetta er ferðin í 1939 heim úr Grønlandi hjá Niels R. Finsen við fleiri hundrað útróðrarmonnum. Niels J. Arge hevur frásøgn um hesa hending í hansara bók Teir tóku Land. Men í 1972 hevði Eyðun Andreassen samrøðu við Axel Dalsgaard úr Skálavík, sum eisini var við. Tað sum Axel ikki hevur tikið við, hava vit úr frásøgnini hjá Niels Juel. Tær flestu myndirnar eru eisini úr hansara bók "Teir tóku land"**


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



*Elias Johannesen í Miðvági, 1877-1954, var tann fyrsti sum fór til Grønlands at rógva út frá landi.Hann var formaður í Ravnoynni í 1939.*

Grønlandsútróður hevði stóran týdning fyri Føroyar í mong ár. Hann var eisini ein partur av politiska orðaskiftinum. Ein tann fremsta grundgeving fyri samband við Danmark var, at uttan ríkisfelagsskap mistu vit rættin til hendan útróður. Men hetta er so alt søga.

Fyrstu royndirnar hjá føroyingum undir Grønlandi vóru í 1906. Fiskiskapur við skipum byrjar rættiliga í 1920-unum, og hann kom at hava sera stóran týdning fyri okkara samfelag í nógv ár. Her var eisini talan um útróður frá skipum.

Tað var í 1934, at føroyingar av álvara byrjaðu at rógva út frá landi í Grønlandi. Tann fyrsti sum roynd hetta var Elias Johannesen, Birtu Lias (1877-1954), sum var úr Miðvági.

Í 1935-36 varð gjørd ein stórsligin roynd við eini flótandi útróðrarstøð, og var hetta Anana, har manningin tilsamans var 160.

## 800 mans søktu til Grønlands

Men fyrstu ferð føroyingar í stórum tali fara til Grønlands at rógva út frá landi var í 1939. Nú varð loyvi fingið umframt í Føroyinghavnini eisini at rógva út í Ravnsoynni og Tovqussak.

Í samráðingum, sum høvdu verið í Keypmannahavn hetta árið, hevði stjórnin játtað at virka fyri, at føroyingar fingu tvær, kanska tríggjar støðir á landi.

Tað var lýst í bløðunum eftir monnum, sum høvdu áhuga, og hann var stórur. Heilir 800 menn søktu. Hetta sigur nakað um, hvussu stórt arbeiðsloysi var tá. Kanska var tað eisini hugurin at royna nakað nýtt.

Ætlanin var at taka til í stórum og at loyva 500 monnum at fara. Til tess at stuðla hesum varð tann 17. mars stovnað lutafelagið Útróðrarfelagið Grønlands. Millum nevndarlimirnar var Poul Juel Djurhuus, Havn, ið tá var formaður í Føroya Fiskimannafelag. Hann var beiggi Hans Andrias Djurhuus, sum var umrøddur í seinastu Miðviku.

Ætlanin var, at hvør maður skuldi inngjalda kr. 25. Teir vóru spurdir, um bátaløgini kundu veita vissu fyri, at teir høvdu ræði á góðum, rúmligum bátum við motori, og um teir kundu skaffa skúrar til goymslu og at búgva í.

Ætlanin var at leiga tvey skip at fara til Grønlands við fólki og útgerð.

Tað gekk tó ikki so væl at fáa fígging. Hetta var ein verkætlan, sum var ætlað at kosta kr. 400.000, og hetta var ikki smápengar tá í tíðini.

Tá ið avtornaði var "bert" møguligt at geva 225 monnum hendan møguleikan at fara til Grønland, men hetta var framvegis eitt stórt tal. Menninir vóru úr øllum landinum, úr Svínoy til Mykinesar og Sumbiar.

Útróðrarfelagið noyddist at læna kr. 60.000 til hesa ætlan. Síðan leigaði felagið danska damparan Niels R. Finsen hjá felagnum Dansk-Norsk at flyta menninar við bátum og útgerð fyri summarið. Skipið skuldi so eisini koma eftir teimum tíðliga um heystið.

Bátsmanningarnar vóru 41 í tali og vóru býttar við 21 til Tovqussak og 20 til Ravns Stóroy. Fíggjarliga var skipað soleiðis fyri, at menninir skuldu gjalda sín part av kostnaðinum fyri at fáa hetta í lag, og kostnaðurin varð so tikin burtur av úrtøkuni.

Farið var av Havnini til Grønlands seinnapartin í mai.

Við sær yvir til Grønlands høvdu teir allar bátarnar og annars alla útgerð, sum kravdist. Tað var salt, proviantur, bensin, olja og ikki minst tilfar til skúrarnar, sum hvør bátsmanning skuldi hava.

Tað hevði ikki verið róð út í hesum plássum fyrr. Tí høvdu teir skúrarnar við úr Føroyum. Teir vóru gjørdir í Havn og settu teir upp har yviri.

Túrurin gekk gott yvir, og teir høvdu tað gott, men umstøðurnar umborð vóru vánaligar. Skipið var als ikki útgjørt til so nógv ferðafólk. Menninir lógu allir á millumdekkinum, har koyggjur vóru settar upp, og her var eisini skaffað. Vaskirúm og toilettir funnust ikki. Teir høvdu gjørt tvey hús á dekkinum, sum vóru nýtt til kokkahús. Onkrir av føroyingunum vóru kokkar fyri føroyingarnar umborð á túrinum.



*Soleiðis búðu útróðrarmenninir. Hesin skúrur var í Ravnoynni.*